# Tingstaðurin á Tinganesi

*Eftir Sámal Petersen.*

## I.

Hetta er ein fyribils frásøgn um merkir í klettinum úti á Tinganesi í Tórshavn.

Higartil eru funnin í Føroyum eini 200 búmerkir ymsastaðni: á Tinganesi, á gomlum brúkslutum, kirkjum, gomlum húsum, einstøkum skjølum o. s. fr. Hvørjar ímyndir, ið goymast í hesum búmerkjum, er ikki altíð lætt at finna fram til, og í hesum umfari skal einki verða sagt um tað.

Fyrr í tíðini, tá ið skrivikynstrið ikki var so vanligt sum í dag, hjálptu menn sær við ímyndateknum ella búmerkjum í staðin fyri at skriva navn sítt, og hesin siður er í mongum førum rættiliga gamal. Mest hevur hann verið nýttur um ár 1500 og út ímóti 1700 (smb. *Tønnesen* 1968 og *Strømme* 1943), tó hevur hann í summum førum verið nýttur bæði fyri og eftir hesa tíð.

Okkara seyðamark, ið vóru ognarmerkir, eru rættiliga gomul (*Seyðabrævið),* sama er við steinhøggaramerkjunum í múrinum í Kirkjubø; til eru einstøk framleiðslumerkir, men tey eru vanliga yngri (eftir egnum kanningum er tað elsta u. l. 200 ára gamalt).

Seyðamarkini og steinhøggaramerkini eru sum sagt rættiliga gomul, meðan tey veruligu búmerkini í Tinganesi allarhelst stava frá tíðini aftaná at ásett varð, at tingbók skuldi skrivast í 1568 (*Zachariasen* 1961).

## II.

Á aldargamla tingstaði føroyinga eru ikki mong beinleiðis sjónlig tekin, sum siga okkum frá teirri tíð, tá ið ting varð hildið har á klettinum.

Síðani 1968 hevur høvundurin havt sína dagligu gongd úti í Tinganesi og hevur verið varur við, at merkini í klettinum har úti eru nógv fleiri, enn higartil hevur verið hildið.

Grótið í Tinganesi er eisini so, at tað er merkt av tíðarinnar tonn. Frostið er farið illa við tí. Í fleiri støðum er tað ovasta lopið uttan av, so um nakað hevur verið høgt ella rist í har, er tað burtur, og okkurt kann vera fjalt undir betongi, tí ikki er sørt nýtt av tí tilfarinum. Tó sæst enn ymiskt í klettinum, ið mannahond hevur verið á. Av áðurnevndu orsøkum kann tí lítið ella einki vera heilt frá gamlari tíð, uttan so at tað hevur verið fjalt undir gróðri ella einumhvørjum øðrum, so tað hevur verið vart móti brimi, regni, frosti og sól, og tað man vera lítið.

Roynt verður her at avmynda tað, sum higartil er komið fram, men fyrivarni verður tikið viðvíkjandi avmyndanini, tí hóast sumt er væl sjónligt, so er nógv sera kámt og ger ein ivasaman, um rætt er teknað. Tekningarnar gera heldur ikki krav uppá at vera púra beinar, men heldur at kalla strikumyndir, so sum høvundurin hevur sæð tær. Á hjásetta korti (faldarin) av Tinganesi eru við talmerktum prikkum sett tey merki, sum funnin eru, og á I.—VIII. talvu eru strikumyndir av og á 2., 3. og 4. mynd dømi um hesi merki. Tølini á talvunum samsvara tølunum á kortinum.

Ein partur av merkjunum sæst einans, tá ið sólin stendur lágt, antin á morgni ella kvøldi, um hóskandi væta er á klettinum, ella hann er heilt turrur. Í summum førum má ein standa nakað burturfrá og fáa ljósglæmuna í ávísan vinkul fyri at hóma, hvat veruliga er rist í klettin. Í skiftandi kavaveðri kemur sumt fram, sum annars ikki sæst, best tá hann á høgætt við einum lítlum loti pínir smáheglingin burtur úr sær, ella eitt heilt lítið kavafølv liggur.

Sumt av tí, ið sæst í klettinum og einstøkum øðrum støðum,

hevur helst ongan annan týdning, enn at tað er har, og kann lítið annað siga okkum. Ein vissan áhuga hava búmerkini.

Ivaleyst hava árstøl verið við flest øll búmerkini, men tey eru so burturkámað ella slitin, at nógv av teimum eru ólesandi í dag. Nøkur av teimum kunnu so dánt skiljast og eru sett við tey merkini, tey hoyra til. Nøkur onnur standa síðst á VII. talvu. Har kann kanska størri ivi vera í, at tey eru heilt røtt.

Líkt er til, at flestu veruligu búmerkini í Tinganesi munnu vera ognarmerkir, og tí liggur nær at reisa gamla spurningin: Hvør hevur átt hesi búmerkir?

Ein skal taka seg í vara at festa gamlar lutir til ávísar eigarar, men her er kanska ikki ovboðið at siga, at næstir til tey eru løgmaður, fúti, skrivari og løgrættumenninir.

Soleiðis sum merkini — eins og skilliga sæst av kortinum — eru sett í hópar á klettinum við 6 merkjum saman í fleiri hópum kann hetta styrkja metan høvundans.

Stutt sagt, hesi nøkur og tríati merkini eru nakað eins á stødd og lítið prangandi. Tey standa flest øll uttan fyri skansapakkhúsið, úr Suðroyargjógv og kluftini vestur um Sjóbúðina.

Líkt er til, at hetta er sjálvt løgtingið (altingið), sum hevur verið hiðani og út uttast á nesið.

Tætt vestanfyri Skansapakkhúsið síggjast einans trý búmerkir: nr. 54 og 55 á V. talvu. og 55a á VIII. talvu. Um nakað er rist í klettin undir Skansapakkhúsinum kann einki sigast um í løtuni, tí har slepst ikki til. Um henda hernevnda skipan á tingi møguliga kann benda á fornan tingsið er ilt at meta um, kanska serstakliga tí, at ikki slepst til lendið undir húsinum.

Tá ið Sigmundur kemur á ting at boða frá kristni, sigur Føroyingasøga, at hann reistist úr sæti og tók til orða. Tingmenn hava tí sitið á tingi, og má haldast, at væl av gróti hevur verið úti á nesinum ella eitthvat annað at sitið á. Hetta var vanligt á øðrum støðum víða hvar.

Innanvert við Suðroyargjógv er einasti steinur, sum stendur

nakað frá fasta klettinum, hann hevur verið hægri at sæð fyrr, tí betong er lagt uttan um hann.

Niður í hann er høgt væl sjónligt búmerki, nr. 1 á I. talvu, við skjøldri uttanum, einasti skjøldur, ið er komin fram á Tinganesi.

Ramman uttan um merkini nr. 6, 7, 8, 9, 10, 11, 12, 13, 14, 15, 16 og 17 á II. talvu og 54 á V. talvu eru neyvan skjøldrar, heldur er ímyndin her tingbúð, tí spíski endin vendir upp.

Áðurnevndi steinur við búmerkinum nr. 1 er kanska tingsteinurin ella tingborðið á Tinganesi, og búmerkið á honum kanska búmerkið hjá løgmanni Pæturi Jákupsson. Hann gjørdist løgmaður 1588 (*Degn* 1937). Ætt hansara var úr Oyrknoyum.

Búmerkið nr. 3 á I. talvu er møguliga sessurin hjá fútanum. Sammett við tingstaðin í Køttlum í Norðoyum og onnur tingstøð í Føroyum (*Winther* 1875), skuldi eisini verið sessur tætt norðanfyri tingborðið, men har sæst einki merki, kanska er tað fjalt av betongi. Frá búmerkinum nr. 5 á I. talvu norður móti Stokkastovuni eru trý onnur merkir, tað eina ein toluliga sjónligur Merkur-stavur, meðan mest sum lítið og einki skil sæst á hinum. Tó vísa tey á eina leið norður undir Stokkastovuni í ein hálvmánaboga norður um trappuna millum Stokkastovuna og Skattadeildina, har búmerkini nr. 57 og 61, VII. talva, standa.

Sammett við Norðoya vártingstað er myndin her sera lík. Leggjast kann afturat søgn úr Tórshavn, munlig frásøgn frá Havnarmanni til høvundans, at tann ákærdi sat, har merkini nr. 57 og 61 eru, og eisini tað, sum *Winther* (1875) skrivar, at tann ákærdi sat norðan á tingi, meðan ákærarin sat fyri sunnan. *Zachariasen* (1961) sigur, at Stokkastovan varð bygd á Tinghelluna. Í 1500—1600 hevur løgrætturin verið meira ting enn sjálvt løgtingið, og tá er kanska ikki ov mikið gjørt av, at halda henda stað vera løgrætturin ella løgrættan. Á tingvøllum í Íslandi er løgrætturin eisini fyri eystan, og almenningurin hevur so staðið ella sitið haðani og vestur eftir Tinghelluni ella Tingbrekkuni (*Jóhannesson* 1969).

Tætt við landsynningshornið á bøkjarínum er kletturin nakað hægri enn tað, sum er uttanum, og hevur stungið seg nakað longur eystur eftir, men ein partur av honum er sprongdur burtur, og tá er hann helst losnaður nakað, ein trivaligur »boltur« av jarni stendur í dag niður ígjøgnum hann. Tað kundi sæð út til, at her hevur verið serstakur sessur stutt aftan fyri ein av løgrættumonnunum ella aftanvert millum tveir av teimum. Hesin sessur er eisini bæði norðuri í Køtlum og á Kjalnestinginum. Hvør, ið hevur havt sæti her, verður ikki lætt at meta um. Hevur hesin maður verið serliga lógkønur og rættleitt løgrættumenninar (lógsøgumaður) og sagt teimum frá tí ið lógirnar áseta? Í hesum sessi eru árstøl og møguligt búmerki, bæði sera kám.

Í tingborðinum stendur eisini árstalið 1609 — sama ár sum kirkjan í Tinganesi varð bygd. Tá ið tingið varð sett, varð gingið frá kirkjuni og oman á tingstaðin inn eystarumegin niður gjøgnum trappurnar, sum funnar vóru nøkur ár herfyri, tá ið kjallarin undir skattadeildini varð útgrivin (óprentað frágreiðing frá S. Dahl). Ringt varð við kirkjuklokkuni ímeðan. Á Selatrað er stað, sum kallað verður klokkutornið, innan fyri har, sum brúgvin er í dag, og skal klokka hava verið har at ringja við, tá ið tingið varð sett (munnlig frásøgn til høvundans). Selatrað er neyvan elsti tingstaður í Eysturoynni. Oman fyri bygdina er Gálgasteinur.

Við øll okkara tingstøð er stað, har bjarging undan dómi hevur verið meira ella minni møgulig. Staðarnøvnini eru mest hesi: Hálgafelli — Halgafelli — Halganasteinur — Frælsi o. s. fr.

So langt aftur, sum vit vita, hava løgrættumenninir verið 6 í tali í hvørjari tingsýsluni, og sýslurnar vóru somuleiðis 6, men í 1688, tá ið Kristian V. norska lóg kemur í gildi (*Føroyskt lógsavn* 1953), verður talið broytt til 8 í hvørjari sýsluni, tilsamans 48, og tí tekur Nólsoyar Páll soleiðis til í fuglakvæðinum: »Har vóru settir rossleypar (løgrættumenn) fýra ferðir tólv, uttan um lundan (Lund, løgmaður, samtíðarmaður við Nólsoyar Páll) girdust teir, sum náttarsólin hálv«.

Nakað um sama mundið, kanska eitt sindur fyri 1670/80, eru helst tey gomlu vártingstøðini niðurløgd í fleiri støðum, og menn eru farnir heim í bygdirnar at halda ting (meting høvundans, ið byggir á tingbøkurnar 1614—1660). Teir gjørdu sær kortini nýggj tingstøð har heima t. d. við Sjógv, á Selatrað, í Trøðum o. s. fr. Tingið ella vártingið var framvegis sett úti, og løgmaður fór aftaná upp á tingsteinin og rópti til fólkið, um tey høvdu mál at føra fram, men viðgerðin fór tá fram innandura.

Ein høvuðsorsøkin til tað, at menn fóru heim til bygdirnar, verður vanliga hildin vera ein munandi broyting í veðurlagnum til tað verra.

Tað skal ásannast, at mangt av tí, sum ført er fram, ber í sær ymisk loyndarmál og krevur gjøllari kanningar, ið kanska geva svarið av tí, sum her er mett um, og serstakliga er tað torført, tí vit eiga so lítið av skrivligum keldutilfari at leita til.

Sunnan fyri Skansapakkhúsið síggjast 4 búmerkir, nr. 32 á II. talvu og nr. 48, 52 og 53 á V. talvu, hesi eru væl størri enn hini, sum rist eru í klettin har í nánd. Kanska hoyra tey til teirra, ið hava starvast við handilin. Nr. 32 kundi verið búmerkið hjá Mikkel Nansen (sonur Hans Nansen borgarstjóra í København), sum hevði handilin í Føroyum í hondum eina tíð (*C. F. Nielsen,* 1520—1887).

Nr. 51 á V. talvu, 4. mynd, er helst tað merkið í Tinganesi, sum torførast verður at siga nakað veruligt um. Líkt er til at hetta eru tveir bátar við nót ímillum, og í tí innara ella norðara bátinum sæst rættiliga sjónligt merki, sum ivaleyst man vera St. Georgskrossurin. St. Georg varð dripin ár 306 e. K., møguliga eru hesir bátar ristir í klettin aftan á ár 1000 ella kanska nakað væl seinri.

Nr. 52 á V. talvu vísir ein sera vakran Merkurstav. Árstalið 1669 er ógvuliga kámt.

Nr. 53 á V. talvu hevur sjónskt árstal 1569, meðan búmerkið líkist einum hálvum nótatekni og hevur hálsin bendan nakað frá sólurinum, 1. mynd, fyri ikki at koma í strikuna, sum

vísir í sunnan. Kanska peikar hetta á, at sólurið er eldri enn 1569. Her skal einki verða sagt um sólurið, av tí eg veit, at annar maður arbeiðir við tí.

Tað kundi sæð út, at sólurini eru tvey í Tinganesi. Fyri umleið einum ári síðani rakti eg við, at nakað óvanligt var í helluni norðan fyri tað sjónliga sólurið, og kannaði eg tað nakað í summar og í heyst, so frægt sum vetrarlýsið loyvdi. Tað er líkt til, at hetta eru leivdirnar av sóluri, men tað er illa veðurbitið og slitið, tí er torført at siga nakað vist um tað. Tað sær kortini út til, at hetta er lutað sundur í fleiri geirar eins og hitt, men tað norðara, sum ivaleyst er eldri, hevur annan vísning, allarhelst høvuðsvísningin útsynningur —landnyrðingur. Eftir tí, ið *Einar Pálsson* (1969) sigur, skuldi tað víst á tekn frá heidnari tíð eins og mong onnur tekin á fleiri tingstøðum í norðanlondum á øðrum støðum.

Annars verður víst til kortið av Tinganesi og talvurnar við búmerkjum og árstølum.

Norðan fyri Suðroyargjógv er hol (smb. kortið) borað niður í klettin og annað í aftanvert við steinin, har lógsøgumaðurin(?) møguliga hevur havt sess. Hetta holið var fylt við skilp og má tí hava nakað væl av árum á baki. Hesin sessur er sum sagt við landsynningshornið á bøkjarínum. Um fleiri hol eru borað longur norðuri undir stokkastovuni, kann einki sigast, tí har er ikki atkomuligt.

Sunnan fyri Suðroyargjógv er hol somuleiðis borað niður í klettin tætt við gjónna. Har síggjast tvey hol, um 50 cm hvørt frá øðrum, og frá sjósíðuni gongur trappa inn á tingið eystantil. Haðani og heilt út á nesið eru fleiri hol borað nakað inni á nesinum.

Frá ytsta enda á nesinum og nakað langt inn síggjast eingi borað hol vestantil fyrr enn væl innan fyri flaggstongina. Eisini her — nakað miðskeiðis á tinginum — eru tvey hol við u. l. 50 cm ímillum.

Har eingi hol eru borað, hava teir í gamlari tíð kílað væl av gróti, so tey kunnu vera farin burtur við grótinum, sum nýtt hevur verið til at byggja við ella til eitthvat annað.

Frá miðjuni á tingstaðnum, har tey tvey áðurnevndu holini eru í klettinum, síggjast fleiri vestureftir og norður við jaðaranum vestantil.

Øll búmerkini, sum higartil eru funnin úti á nesinum uttan fyri Skansapakkhúsið, síggjast innanfyri farleiðina, ið hesi boraðu holini vísa. Øll holini hava tvørmátið 25 mm.

Har flaggstongin stendur í dag er sjónlig trappa inn á tingið, og er hon kílað eins og tann eystantil. Tað kann tykjast, sum tær eru gjørdar, áðrenn menn dugdu at spreingja grót.

Hvørja farleið vísa hesi boraðu hol á?

Báðumegin Suðroyargjógv eru tvey hol borað inn í klettin, og tað kann vera ivi um, hvørt tey hoyra saman við hinum. Tað liggur næst at meta, at tey vísa á vebondini bæði uttan um sjálvt løgtingið (altingið) frá Kluftini og ytst út á nesið — og uttan um løgrættin fyri eystan. Nakað, sum kann styðja hesa metan, er tað, ið *Helgason* (1951) skrivar um Kongsbókina, tann parturin, sum nevndur verður Hundabrævið: »Var þetta gort a logþingi innan vebanda«, sum sigur, at veband var á tingi um 1350—1400 og allarhelst langt áðrenn tað. Búmerkini kunnu tí eisini vísa okkum á rættiligan gamlan tingsið bæði á løgtingi og í løgrættinum, tí suður-eystan fyri Tingborðið er eisini hol borað niður í klettin, og norður-eystan fyri sama Tingborð er annað holið, somuleiðis beint eystan fyri har tann ákærdi eftir søgnini skuldi sita, er triðja holið borað, og eini tvey onnur hava verið har, men ein partur av teimum er kílaður frá (smb. kortið). Beint framman fyri Stokkastovuna er einki at finna, kanska kemur tað av, at har hava teir onkuntíð seint í tíðini sprongt rættiliga væl burtur av klettinum, sum fyrr hevur verið væl longri út frá Stokkastovuni. Sunnara sporið í Vippuskerinum vísir beint á klettin har.

Tað sær tí út til, at veband hevur verið um allan løgrættin.

Sum heild kann vera sagt um búmerkini úti á Tinganesi, at ein partur minnir nógv um búmerkini av vesturlandinum í Noreg, meðan ein annar partur líkist donskum. Tað er eyðsæð, at fleiri av teimum hava rúnur ella rúnulíknandi tekn í

sær, sum vísa á, at menn her á landi hava verið kunnigir við rúnur langt upp í 16. øld.

Ikki úti á Tinganesi, men aðrastaðir í ymiskum støðum í Føroyum, eru funnin búmerkir, sum í tilevning hava fingið árin av hollandskum, eingilskum og skotskum búmerkjum (smb. *Tønnesen* 1968 og *Homeyer* 1870).

Hóast høvundurin hevur gjørt nakrar minni kanningar á ymiskum vártingsstøðum aðrastaðir í oyggjunum, verða tær ikki tiknar við í hesum umfari. Eisini tær vísa á mangt áhugavert.


SUMMARY

The article describes the old marks and bore holes at *Tinganes* (the ancient Faroese thingstead), Tórshavn, which the author has observed during the period 1968—72. The map shows the position of the marks; they are drawn on Tables I—VIII.


BÓKMENTIR


*Andersen, N.:* Færøerne 1600—1709, Kbh. 1895 (1964).

*Degn, Anton:* Nøkur gomul áður óprentað brøv o. a. Føroyum viðvíkjandi. Varðin *17: 193—209 og 255, 1937.*

*Føroyskt lógsavn 1687—1953.* Tórshavn 1953.

*Færeyinga Saga.* Udg. af C. C. Rafn, Kjøbenhavn 1832. Pp. 280 (+ 4), s. 140.

*Helgason, Jón:* Kongsbókin úr Føroyum. Útiseti. Árbók Føroyingafelags VI, bls. 101—122, Keypmannahavn 1951.

*Homeyer, C. G.:* Die Haus- und Hofmarken. Berlin 1870.

*Jóhannesson, Jón:* Islands historie i mellomalderen. Fristatstiden. Oversatt af Hallvard Magerøy. Oslo 1969.

*Løgtings- og Vártingsbókin 1655—66.* Skrivað av og givið út hevur Einar Joensen. Tórshavn 1953.

*Nielsen, C. F.:* Landfogederne på Færøerne 1520—1887. (Óprentað. Til skjals á Føroya Landsskjalasavni).

*Pálsson, Einar:* Baksvið Njálu. Reykjavík 1969.

*Seyðabrævið 1298.* Útg. Føroya Fróðskaparfelag. Tórsh. 1971.

*Strømme, L.:* Bomerke fra Sunnmøre. 1943.

*Tingbókin 1615—54.* Skrivað av og givið út hevur Einar Joensen. Tórshavn 1953.

*Tønnesen, Allan:* Helsingørs Bomærker. Samfundet for Dansk Genealogi 1968.

*Winther, Niels:* Færøernes Oldtidshistorie. Kjøbenhavn 1875.

*Zachariasen, Louis:* Føroyar sum rættarsamfelag 1535—1655. Annales Societatis Scientiarum Færoensis. Supplementum IV. Tórshavn 1961.

*Talva 1.*



*Talva II.*



*Talva III.*



*Talva IV.*



*Talva V.*



48



49



50



51



52

53



54



55



*Talva VI.*


63
JG Midjord
LIVA
64
Dionie
65
ZOWS
66
JR
67
JFS
68
JA
69
SA
1723
70
CH Kon
1710
71
JAD
72
GHS
73
SCSR
74
75

*Talva VII.*


56
57
58
59
60
AMA
61
62
16 93
F. V. SABEL
1568 1573 1587 1625
1681 1775 1783

*Talva VIII.*





1. mynd. *Yngra sólurið, møguliga frá 1459?*



2. mynd. *Eldra sólurið, strikað við kriti — kanska 500 ár eldri enn tað yngra.*



3. mynd. *Sama sum 2, tikið í kava — eldri ringurin partvís sjónligur.*



4. mynd. 2 *bátar við nót ímillum — vestan fyri sólurini. Sbr. nr. 51 á V. talvu og kortið.*